SJÓVAR KOMMUNA

Samb. lóg nr. 458 frá 30. juni 1993 um fólkatingsval í Føroyum við seinni broytingum, verður fólkaatkvøða um broyting í trónuarvalógini

**sunnudagin 7. juni 2009**

atkvøðugreiðslan verður í bygdahúsinum á Strondum frá kl. 9:00 til kl. 20.00 ella so leingi, veljarar møta uttan steðg.

Veljarar, ið verða burturstaddir valdagin, kunnu velja við brævatkvøðu á kommunuskrivstovuni **í seinasta lagi fríggjadagin 5. juni, kl. 12:00.**

Veljarar, ið vegna sjúku ella annað, ikki kunnu koma á valstaðið, og ynskja at velja heima, skulu boða kommunuskrivstovuni frá **í seinasta lagi fríggjadagin 5. juni, kl. 12:00**

Valkort verða borðin veljarunum. Veljari, ið ikki hevur fingið valkort, eigur at venda sær til kommunuskrivstovuna skjótast gjørligt.

**Minnist til, at hava valkortið við á val.**

**Sjóvar kommuna**
Skúlavegur 10
490 Strendur

Vágs Kommuna

# KUNNGERÐ

Vísandi til at fólkaatkvøða um broyting í trónuarvalógini er útskrivað og verður sunnudagin tann 7. juni 2009, verður hervið kunngjørt, at veljarar greiða atkvøðu í samkomuhøll skúlans. Atkvøtt verður frá

**kl. 09.00 til kl. 20.00**
ella so leingi, veljarar møta uttan steðg.

Veljarar, ið hava rætt at nýta brævatkvøðu, kunnu greiða atkvøðu á býráðsskrivstovuni til og við fríggjadagin 5. juni kl. 12.00.

Tey, ið vegna sjúku ella vantandi førleika ikki kunnu koma á valstaðið, kunnu velja heima, men má boðað verða frá til býráðsskrivstovuna tlf. 733009 í seinasta lagið tórsdagin 04. juni 2009 kl. 1600.

Valkort verða send øllum teimum, ið standa á vallistanum. Veljari, sum ikki fær valkort, ella fær valkort við villum í, eigur at venda sær til býráðsskrivstovuna sum skjótast.

**Valstýrið í Vági**

VENJINGARSKÚLIN

VENJINGARSKÚLIN
handan Á 14 · Box 59 · FO-110 Tórshavn

## Søkt verður eftir tveimum varaskúlastjórum

Í sambandi við at vit fara at umskipa leiðsluna í Venjingarskúlanum, verður eitt nýtt starv sum varaskúlastjóri í Venjingarskúlanum lýst leyst til setanar frá 1. august 2009.

Fyri varaskúlastjóra í farloyvi, verður starvið sum fyribilssettur varaskúlastjóri lýst leyst til setanar frá 1.august 2009 til 31. juli 2010.

**Søkt verður eftir varaskúlastjórum, sum**
- undir ábyrgd og í samstarvi við skúlastjóran skulu taka lut í teirri fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluni í skúlanum
- duga at samstarva og eru fyrikomandi
- eru fúsir at taka á seg uppgávur í samstarvi við og eftir fyriskipan skúlastjórans.

**Harumframt skal varaskúlastjórin**
- vera næsti medarbeiðari skúlastjórans
- saman við skúlastjóranum og hinum varaskúlastjóranum taka á seg fyrisitingarliga ábyrgd
- undir fráveru skúlastjórans hava ábyrgdina av leiðslu skúlans
- vera førur fyri at loysa trupulleikar
- saman við skúlastjóranum skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri medávirkan og medábyrgd.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava læraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er undir Mentamálaráðnum við fyribilstænastu í Venjingarskúlanum. Tey, ið sett verða, eiga at tola broytingar starvinum viðvíkjandi.

Størvini verða lønt í lønarflokki 35.1 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag og verða sett sum sáttmálasett størv, uttan so, at tey, sum sett verða, er tænastumenn frammanundan.

Skylduga undirvísingartímatalið verður ásett eftir galdandi reglum.

Umsóknir við ljósriti av prógvum og CV og møguligum viðmælum skulu verða sendar skúlanum.

Freistin at søkja er 4. juni 2009 kl. 15.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Petur Ova Petersen, skúlastjóra á telefon 213502 ella 301529.

Í Venjingarskúlanum verða komandi skúlaár umleið 440 næmingar í 19 flokkum, og her koma at starvast 45 fólk. Lærararnir eru skipaðir í 4 deildir: 1.-3. fl., 4. og 5. fl., 6. og 7. fl., 8.-10. fl. Skúlin húsast í trimum bygningum : 1., 2. og 3. b halda til í Ytra skúla við Landavegin, 1., 2. og 3. a í Heimara skúla við Fr. Petersens gøtu, og 4.-10. fl. eru í skúlanum á Stórheyggi.

Sosialurin
www.sosialurin.fo

## Fólkaatkvøðu viðvíkjandi “ændring af tronfølgeloven” tann 7. Juni 2009

Fólkaatkvøðan viðvíkjandi “ændring av tronfølgeloven” verður í Ungmannafelagshúsinum Virkinum á Sandi.

**Atkvøðutíðin verður:**
Kl. 09.00-20.00 ella soleingi veljarar møta uttan steðg, og tá ið valið verður lýst liðugt.

**Brævatkvøður:**
Veljarar í Sands kommunu, ið sambært vallógina lúka treytirnar fyri at greiða brævatkvøðu, kunnu atkvøða á kommunuskrivstovuni í avgreiðslutíðini til og við 5. juni 2009.

Tey, ið vegna sjúku ikki eru før fyri at koma á valstaðin, kunnu boða kommunuskrivstovuni frá á tlf. 361034 í seinasta lagi 4. juni 2009 kl. 13.00.

Grundlógardagin 5. juni 2009 hevur kommunuskrivstovan opið frá kl. 9.00 til 11.00

**Valkort:**
Við hesum verður gjørt kunnugt, at til fólkaatkvøðuna viðvíkjandi “ændring af tronfølgeloven” tann 7. juni 2009, verða valkort send øllum veljarum í kommununi.

Um onkur, ið heldur seg hava atkvøðurætt, ikki hevur fingið valkort, ella okkurt annað er komið skeivt fyri, skal verða sagt kommunuskrivstovuni (tlf. 361034 ) frá í seinasta lagi 4. juni 2009.

*Sandur, 26. Mai 2009*

SANDS KOMMUNA
trygd og trivnaður fyri øll

Mørkin Mikla 3 | | FO-210 Sandur | Tlf. 361034 | www.sandur.fo



**Bilur til sølu**

**Opel Zafira 1.8 vøruvognur.**
**Árg. 2006. Koyrt uml. 20.000 km.**
**165.000 v/mvg**

PLÁTUVERKSTAÐIÐ
v/Glenn Perdomo · tel 32 17 78 / 22 17 78 · www.plv.fo